# Málið er at koma upp á pláss aftur

**Í B68 fara teir nú undir fyrireikingarnar til nýggja kappingarárið, tá ið avgjørda málið verður at fáa liðið aftur í bestu deildina**

B68
*Jóannes Hansen*

Fyri fyrstu ferð síðani 1980 verður tað næsta ár leygardagsfótbóltur á Toftum. Tað valdaði tøgn í skiftisrúminum eftir 4-2 tapið móti EB/Streymi. Spælararnir høvdu lagt tað í, sum teir orkaðu, men hesa ferð spældu teir móti einum heilt góðum liði. Ivaleyst mundu hugsanirnar ferðast til aðrar dystir, tá ið tað ikki hevði roynst nakað serligt.

B68 formaðurin, Niclas Davidsen, staðfesti veruleikan, sum hann nú er:

– Nú eru vit fluttir niður. Tað taka vit til eftirtektar, og so mugu vit arbeiða og leggja til rættis út frá tí veruleikanum. Vit halda okkum hava karmarnar til 1. deildarfótbólt. Tí skulu vit ikki hugsa so nógv um tað næsta ár. Tá verður avgjørda málið at flyta upp aftur í bestu deildina. Vit hava eina uppgávu, og tað er at hugsa um tað, sum skal ganga fyri seg á vøllinum.

*Er tað greitt, hvussu tað verður við venjara og spælarum?*

– Vit eru júst fluttir niður. Tað hevur ikki borið so væl til at lagt til rættis, tá ið vit ikki hava verið greiðir yvir, um tað nú fór at vera í bestu ella næstbestu deildini, at vit fóru at spæla. Hetta er nakað, sum vit skjótt fara at taka upp.

*Hvussu vóru tit nøgdir við avrikið hesa ferð?*

– Okkara gjørdu tað, sum teir orkaðu. Mótstøðuliðið var rættuliga gott. Teir skoraðu tvey mál fleiri enn okkara, og tað kunnu vit ikki siga so nógv um, staðfestir formaðurin í B68, Niclas Davidsen.

B68-EB/Streymur 2-4 (2-2):

# B68 fór um koll í góðveðrinum

**Gestirnir á Svangaskarði staðfestu, at teir eiga eitt fínt fótbóltslið, har breiddin hesa ferð rættuliga stóð sína roynd**



*Toftamenn stríddust, men teir gjørdust ov stuttir móti EB/Streymi, og so er tilveran í bestu deildini fyribils av*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

B68-EB/STREYMUR
*Jóannes Hansen*

Tað var stórur kontrastur, tá ið dómarin hevði brískslað fyri síðstu ferð. EB/-Streymur hevði vunnið 4-2, og tá ið tað gjørdist greitt, at Skála einki hevði fingið burturúr, fegnaðust teir í Sundalagnum eyka um, at nú hava teir møguleika at vinna bronsumerkini.

B68 spælararnir fóru stillisliga av vøllinum. Teir høvdu verið annar parturin í teirra egnu jarðarferð. B68 hevði roynt at gera tað, sum teir vóru mentir. Tað var bara ikki nóg mikið. Mótstøðuliðið hevði størri breidd og tyngd, og tað var rudduliga staðfest, at á EB/Streyma liðnum eru fleiri spælarar, sum eru stinnir í framrættaða spælinum, samstundis sum tað hongur væl saman millum keturnar. Gunnar á Steig ger ikki nógv hóvasták burturúr sær, men hann er tryggur. Pacek er stinnari, enn hann leingi hevur verið, og Fróði Clementsen er eisini hollur í miðverjuni. Gert Hansen og Jóhann á Stongum byrgdu væl fyri í borðunum. Hans Pauli Samuelsen og Bárður Olsen eru góðir í miðvallarborðunum, Jákup Martin Joensen og Marni Djurhuus stríðast væl á sentrala miðvøllinum, og í álopinum seta Sorin Anghel og Sonni L.Petersen støðugt mótstøðuverjuna undir trýst.

Eftir steðgin noyddist EB/Streymur at klára seg uttan bæði Sorin Anghel og Fróði Clementsen, men tað tóktist ikki at bila. Teir umskipaðu tvær ferðir. Fyrst fór Hans Pauli Samuelsen í álopið, Jákup Martin Joensen í vinstru og Knút Vesturtún á sentrala miðvøllin, og so fór Knút í miðverjuna, Hans Pauli aftur á miðvøllin og Hallur kom inn í álopið.

Tað var ferð og nerva í fyrsta stóra tíman. Men mesta partin av fyrra umfarinum var spælið ikki serliga flótandi. B68 legði bragdligari fyri, og tað var einki forgjørt í tí, at teir eftir hálvan tíma fingu hol á. Eftir skjótt álop í høgru varð Eyðstein Skipanes feldur, og Anderson var tryggur úr ellivu metrum.

Fýra minuttir seinni brískslaði dómarin aftur fyri brotssparki. Sorin Anghel lá flatur, eftir at hann hevði roynt at draga framvið einum reyðum, og Sonni L. Petersen umsetti úr ellivu metrum.

Fyrsta ábendingin, um at B68 kundi líða skipbrot, kom, tá ið tað restaðu átta minuttir av fyrra umfarinum. Eftir frísparksframlegging mitt í brotsteigin sneiddi Sorin Anghel ein av, og flata skotroyndin eitt sindur úr vinstru endaði við 2-1 máli til EB/Streym.

B68 svaraði aftur fimm minuttir undan hvíldini. Bólturin stakk til Stanislav Stankov, sum mitt fyri setti framvið Gunnari á Steig.

### Besta løtan

Eftir steðgin var spælið eina góða løtu væl betri, enn tað hevði verið undan steðginum. Serliga teir í EB/Streymi funnu væl hvønn annan. Tá ið umfarið var níggju minuttir gamalt, løgdu teir seg framum aftur. Eftir innkast í vinstru, sneiddi Hans Pauli Samuelsen til baklinjuna. Í verjuspæli er tað skandala at geva loyvi til, at maðurin við bóltinum fer framvið á sjálvari linjuni. Tað megnaði Hans Pauli, og tá ið hann lyfti inn fyri málið, stóð høgri vongverjin, Gert Hansen, púra leysur mitt fyri og skoraði við høvdinum.

Tólv minuttir seinni undirstrikaði Sonni L. Petersen, at hann í løtuni er vandamiklasti álopsspælarin í landinum. Við fremra stólpan stýrdi hann innleggi úr høgru upp í nettakið, og so var tað greitt, at B68 næsta ár skal spæla í næstbestu deildini, meðan EB/-Streymur leygardagin skal stríðast um bronsumerkini.

At Anderson, sum fyrsta tíman hevði verið væl upplagdur, varð rikin av vøllinum fyri púra viðsíðuna av eftirtakling, tá ið eitt korter restaði, kundi ikki takast fyri annað enn frustratión um veruleikan soleiðis, sum hann hevði tikið seg upp. At brasilski álopsmaðurin - eftir at hava fingið reyða kortið - skumpaði dómaran, fer ikki at gera leikbannið styttri.

**FAKTA**

**B68-EB/Streymur 2-4 (2-2)**
1-0: Anderson br 29.
1-1: Sonni L. Petersen br 33.
1-2: Sorin Anghel 37.
2-2: Stanislav Stankov 40.
2-3: Gert Hansen 54.
2-4: Sonni L. Petersen 66.
**Dómari:** Eiler Rasmussen
**B68:** Meinhardt Joensen - Ronni Svalbard (Mikkjal Thomassen, 75.), Oleif Joensen, Kári Sigvardsen, Øssur Hansen - Stanislav Stankov (Kristian Anton Andreasen, 60.), Bogi Petersen, Eyðstein Skipanes (Fabricio, 79.), Øssur Jacobsen - Anderson, Jóhan Petur Poulsen
**Gult kort:** Øssur Hansen
**Reytt kort:** Anderson 75.
**EB/Streymur:** Gunnar á Steig - Gert Hansen, Andrzej Pacek, Fróði Clementsen (Hallur Jacobsen, 46./Esmar Eiðisgarð, 80.), Jóhann á Stongum - Bárður Olsen, Jákup Martin Joensen, Marni Djurhuus, Hans Pauli Samuelsen - Sonni L. Petersen, Sorin Anghel (Knút Vesturtún, 43.)
**Gult kort:** Marni Djurhuus, Hallur Jacobsen

# Hingu við høvdinum eina løtu

**Men í steðginum vóru gestirnir á Svangaskarði samdir um, at hóast teir høvdu mist tveir stuðlar, so noyddust teir at vísa heilt øðrvísi hugburð, og tað eydnaðist**

EB/STREYMUR
*Jóannes Hansen*

Fyri fyrstu ferð nakrantíð hevur EB/Streymur møguleika at vinna heiðursmerkir og harvið at kvalifisera seg til Intertoto Cup kappingina. Á Mølini leygardagin verður gjørt av, um tað skal vera EB/Streymur ella Skála, sum fær henda heiðurin.

– Hetta verður mest spennandi dysturin í síðsta umfarinum. Tað man vera fyri at fáa spennandi uppgerð um síðsta altjóða plássið og bronsumerkini, at kappingin er løgd soleiðis, at EB/Streymur og Skála skulu spæla í 18. umfarinum, staðfestir EB/Streyma liðformaðurin, Jákup Martin Joensen, skemtandi.

*Nú er tað upp til tykkum sjálvar at avgera?*

– Vit spældu við henda ynskitankan í síðstu viku. Men vit skulu vísa betri avrik, enn vit gjørdu í 1. hálvleiki hesa ferð, um tað skal eydnast at vinna á Skála. Í steðginum, tá ið vit høvdu mist Sorin Anghel og Fróða Clementsen, hingu vit eitt sindur við høvdinum. Vit vóru ikki nøgdir við hugburðin, sum vit høvdu víst í 1. hálvleiki. Men so samdust vit um, at hetta bar ikki til, nú bronsan og Europa var so tætt undir borðinum. Vit hava onkra ferðina spælt betur, men eg eri stak væl nøgdur við hugburðin, sum vit vístu eftir steðgin, sigur Jákup Martin Joensen.

Sorin Anghel breyt nøsina, Fróði Clementsen hevði pínu í rivjabeinunum, og Hallur Jacobsen noyddist út, tí hann hevði trupulleikar við hælinum. Í EB/-Streymi verður vónað, at allir verða tøkir, tá ið finalan um bronsuplássið leygardagin verður á Mølini.



# Afturhvarv á Toftum

**Tað gjørdist til eitt fyribils farvæl, tá B68 mánakvøldið mátti ásanna, at veruleikin nú snýr seg um dystir í aðru deild í komandi kappingarári. Einki er tó at ivast í, at uttan B68 verður besta føroyska deildin eina uppliving fátækari**

B68-AFTURHVARV
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Trý gullmerki, eitt silvurmerki og seks bronsumerki. Tað er úrtøkan, sum B68 hevur havt í bestu deildini, síðani teir í 1981 fyri fyrstu ferð royndu seg í deildini. Sanniliga avrik, sum tey fægstu feløgini kunnu standa mát við, men fyribils eru hetta nú tøl, sum eru farin í gloymibókina.

Kaldi veruleikin sigur kann lesast á stigatalvuni. Og boðini haðani eru greið. Toftamenn mugu til komandi kappingarár smyrja seg við at spæla fótbólt í næstbestu deildini, eftir at teir í samfull 24 ár hava verið partur av toppinum av føroyskum fótbólti.

Og tað er helst einki at ivast í, at tað eru fleiri við toftamonnum, sum harmast um hetta. Tí hóast nostalgi og kenslur sum so ikki bera nøkur stig við sær, so hevði føroyskur fótbóltur verið nógv fátækari, um ikki toftamenn høvdu verið við í bestu deildini hesa næstan fjórðings øldina.


Síða 10 ÍTRÓTTAR Sosialurin Nr. 35 — 24. september 1985

*B68, 1. deild, sum gjørdist føroyameistari 1985: Standandi frá vinstru: Jens Erik Rasmussen liðleiðari, Eyðfinn Olsen, Ingmar Højgaard, Aksel Højgaard, Jógvan Martin á Regni, Absalon Hansen, Olaf Magnussen og Óli Heri Joensen. Húkandi: Kjartan Nesá, Jørn Kramer, Edmund Joensen, Petur Hans Hansen, Ingolf Petersen, Ashjørn Hansen, Jens Christian Hansen og Per Mikkelsen*

**Føroyameistarar — annað árið á rað**

Dysturin í Runavík sunnudagin var øgvuliga spennandi fyri toftamenn.

B68 hevði møguleika at tryggja sær meistaraheitið longu fyri góðari viku síðan, tá teir leiktu móti GÍ á Toftum. Treytin var, at teir vunnu tann dystin.

Men tað skuldi ikki vera. B68 greiddi »bert« javnleik, og harvið høvdu bæði HB Og KÍ framvegis møguleika, hóast B68 fekk meistaraheitið við at greiða javnleik.

Men um B68-leikararnir høvdu havt trupulleikar við nervum áðrenn dystin, so nýttust teir ikki at hugsa størvegis um tað, tá dysturin var komin í gongd.

B68 sýndi nevniliga væl kvikari spæl enn NSÍ.

Tó so, NSÍ royndi sítt ítarsta, og hampiliga væl kom burturúr. Men teir høvdu sera trupalt at bróta ígjøgnum verjuna hjá B68.

B68 kom á odda tá 8 minuttir vóru leiktir av dystinum.

Tað var Petur Hans Hansen, sum slapp leysur og setti bóltin í netið.

Men hóast B68 kom á odda so tíðliga í dystinum, so gekk ikki so gott hjá teimum at byggja álopið upp. Spælið gekk nógv fyri seg á miðjuni, og tú sá ikki so nógvar vandamiklar málmøguleikar í byrjanini av dystinum.

Men so við og við batnaði spælið. Tó eydnaðist tað hvørgum liðunum at fáa nakað mál afturat.

Serliga í seinna hálvleiki gjørdist yvirvágin til B68 meira týðilig, og teir høvdu fleiri vandamiklar møguleikar.

M. a. høvdu teir skot á stongina, og aðrar møguleikar, sum lættliga kundu givið mál.

Eisini NSÍ hevði onkrar møguleikar, men ikki næs til so nógvar B68.

Tí var tað ein fult uppiborin sigur til B68, hóast ein onkuntið hevur sagt teir spælt vakrari fótbólt.

Í fagrasta veðrið gjørdist B68 so aftur Føroyameistari í ár, annað árið á rað.

Ítróttarsosialurin nýtir hervið høvi at ynskja B68 og toftamonnum hjartaliga tillukku við bragdinum at gerast Føroyameistarar í 1. deild — annað árið á rað.

*Eitt minni um gyltu tíðirnar á Toftum. Við einum máli frá blaðunga Peturi Hans Hansen, vann B68 1-0 á NSÍ, og kundu teir so annað árið á rað rópa seg føroyameistarar*

### Kollvelting í føroyska fótbóltsheiminum

Fyrstu árini, sum toftamenn komu upp, var talan at kalla um eina ævintýrkenda støðu. Kanska ikki bara á Toftum, men í Eysturoynni sum heild.

Her høvdu fuglfirðingar í 1979 sum fyrsta eysturoyarliðið nakrantíð vunnið gull í FM-kappingini, og yvirhøvur vóru nógva staðni greið tekin um ta framgongd, sum fótbóltinum í Eysturoynni var fyri. Sama árið - í 1979 – fór GÍ flúgvandi ígjøgnum aðru deild, og við fullum stigatalið! vunnu teir sær rætt til at spæla í bestu deildini. Gøtumenn hava nærum ikki litið aftureftir síðani tá, og fram til í ár tóktist tað sama vera galdandi fyri B68.

Teir vunnu aðru deild árið eftir – í 1980 – og alt fyri eitt gjørdu teir vart við seg. HB og TB kappaðust sum vant um gullið, men eysturoyarliðini settu tó sína spor í hesa kapping. HB tapti bert trúggjar ferðir hetta árið. Tvær ferðir fyri GÍ og eina ferð - Í Gundadali – fyri B68. TB fekk tó ikki gjørt sær dælt av hesum, og høvdu teir bara vunnið ein av dystunum móti B68, kundu teir ognað sær gullið, men báðu ferðirnar megnaði nýggja liðið at fáa javnleik, og so vann HB gullið við betri málmuni enn TB. GÍ gjørdist nummar trý og B68 nummar fýra, so ein nýggjur maktdepil var spakuliga at hóma.

Næsta árið verður ofta sagt at vera tað truplasta hjá einum uppflytara, og hetta var 1982 eisini gott dømi

*Framhald á síðu 22*